Skúlin 40 ár

Úr gerðabókini fyri lærararáðið við Miðvágs/Sandavágs skúla:

Týsdagin 3.apríl 2001 eru tað 40 ár síðani Miðvágs-Sandavágs skúli varð vígdur.

Í hesum sambandi verður skipað

fyri lítlum hátíðarhaldi á Giljanesi kl. 10.

Foreldur eru sjálvandi vælkomin við.

Børnini møta tó sum vanligt, har tey eiga at møta kl. 8. Børnini í bygdaskúlunum verða flutt inn á Giljanes og heim aftur við bussi.

Allir næmingar skulu vera í hvítum klæðum oman beltið.

Miðvágs-Sandavágs skúli

Byrjað verður í ítróttarhøllini kl. 10. Næmingarnir saman við lærarunum sita á áskoðaraplássunum í høllini.

Skúlastjórin, Emmy S. Joensen, bjóðar vælkomin. Síðani verður sungin: ”Lógu alt frá fornu tíð”, yrktur til 25 ára dagin hjá skúlanum í 1986.

Heini F. Petersen, fráfarin lærari, heldur røðu. Sungin verður síðani: ”Til lukku: Skúlin fyllir ár í dag.”

Sigurð Petersen, fyrrverandi skúlastjóri, heldur síðani røðu og sungin verður: ”Boðar tú til allar tjóðir”.

Eftir hesa hátíðarløtu fara øll úr ítróttarhøllini út á spæliplássið, har næmingarnir gera eitt 40 tal.

Tórhallur Simonsen,lærari, fotograferar av takinum á fimleikarhøllini. Jafet Thomassen í Sørvági tekur upp fyri Sjónvarp Føroya. Næmingarnir fáa eina ella tvær ballónir, fyltar við helium, í hondina, sum allar verða sleptar upp samstundis. Umleið 500 ballónir.

Síðani fara øll aftur í ítróttarhøllina, har borðreitt er. Borðini eru sett upp sum 40 tal.

Næmingarnir sessast við borðið, har teir fáa sunkist og so nógv av kakumanni, sum teir orka, meðan lærararnir og tey vaksnu annars fáa kaffi og lagkøku.

Liðugt umleið kl. 12.

==========

Røða á 40 ár degi skúlans 3. apríl 2001

Í dag fyllir hesin skúlin – Miðvágs-Sandavágs skúli – fjøruti ár.

Í Miðvági og Sandavági standa tveir gamlir skúlar. Hvussu mundu teir vera, tá ið børnini gingu í skúla har, áðrenn hesin skúlin kom?

Jú, nú skal eg siga tykkum frá, hvussu var at ganga í skúla har. Har vóru bara tríggjar skúlastovur. Í Miðvági hevði skúlin eina stovu uppiá í kommunuhúsinum aftrat. Eingin miðstøðuhiti var, bert ovnar, sum brendu kol. Lærarin mátti ofta leggja afturat, at eldurin skuldi ikki slókna út.. Stovurnar vóru ikki so stórar sum hesar. Fimleikahøll var eingin, so tey høvdu onkuntíð fimleik í losjuni í Sandavági. Einki rættiligt spælipláss var tá.

Í 1960 vóru í Miðvági 118 børn í 6 flokkum og 4 lærarar. Teir vóru: Jóan Hendrik Samuelsen, Jens Vang, Napoleon Petersen, Petur J. Sigvardsen og ein vikarur.

Í Sandavági vóru 101 børn í 5 flokkum, 4 lærarar: Sigurð Petersen, Páll Thomsen, Heini Petersen og Elias K. Petersen.

Nógv fleiri skúlabørn vóru komin tey seinastu mongu árini, so at øll rúmtust ikki inni í teimum gomlu skúlunum. Nú var neyðugt antin at byggja upp í skúlarnar ella at byggja nýggjar skúlar.

Á fundi í skúlanum í Sandavági á vári í 1955, har sóknarstýrini, skúlanevndirnar og lærarar í Miðvági og Sandavági vóru á fundinum, var avgjørt at fara í samarbeiði at byggja ein felagsskúla á Giljanesi. Hetta var søgulig avgerð, tí at tað var fyrstu ferð, at felagsskúli varð bygdur í Føroyum.

Stutt eftir varð farið í holt við at fyrireika og at byggja skúlan. Á vári í 1961 var skúlin liðugur. Annan páskadag, 3. apríl, varð hann vígdur. Nógvur kavi var

henda dagin, so at grivið mátti verða við spaka bygdanna millum, tá vóru ongar gravimaskinur.

Hetta var hátíðardagur. Fløgg vórðu vundin á stong í bygdunum og her uttan fyri skúlan.

Skúlabørnini gingu í skrúðgongu úr báðum bygdunum. Tað var eins og tey vendu teim gomlu skúlunum og farnu skúlatíðini bakið og gingu inn í nýggjan skúla og nýggja tíð.

Til stuttleika skal eg nevna, at mær er sagt, at í Miðvági gjørdu tey seg til reiðar í skrúðgonguna. Ikki skuldi verða farið til gongu, fyrr enn fyrstilærarin blásti í floytuna. Men ein drongur hevði floytu í lummanum og kom av óvart at floyta, so at næmingarnir fóru til gongu, áðrenn øll vóru komin á pláss. Tí máttu lærararnir fáa tey at steðga aftur. Tá var tann lítli drongurin snópin.

Nógv fólk var komið saman á Giljanesi til vígsluna. Høllin var stúgvandi full. Hefti við sálmum og sangum var prentað. Albin Vang, formaður í sóknarstýrinum, var fyrstur at halda røðu. Hann byrjaði við fyrstu reglunum úr yrkingini hjá Mikkjali á Ryggi: ”Um tú vilt gleði vinna, søk ei til hægsta sal! Nei, eydnan er at finna, har grannar semjast væl.” Jákup Joensen, próstur, helt vígslurøðuna og vígdi skúlan. Hann segði millum annað, at skúlin var gott ýti hjá útróðrarmonnum. Tá ið hann kom vestur um Koltursnakk á ferð vestur á Miðvág, hevur hann sæð henda prýðiliga skúlan og hevur hugsað um hetta góða ýtið.

Seinni var borðhald í fimleikahøllini fyri innbodnum. Har vóru nógvar talur hildnar og nógv góð ynski fyri nýggja skúlanum.

Tá ið næmingarnir komu í skúla eftir páskafrítíðina fingu teir ís í fimleikahøllini. Henda dagin var sera gott veður, sólin skein, so at heitt var bæði inni og úti. Ísurin hevði hug at bráðna, so børnini máttu skunda sær at eta.

Í 1959 kom preliminerdeild her í Vágum, so meðan skúlin varð bygdur, máttu broytingar verða gjørdar í skúlanum, so at hann kundi hýsa framhaldsdeildini. Teir báðir fyrstu preliminerflokkarnir gingu í gamla kommunuhúsinum í Sandavági, meðan bygt varð.

Hetta var sera stórt framstig fyri Vágar. Nú bar til at ganga í framhaldsskúla og búgva heima. Fyrr máttu tey burtur, tað var ógvuliga dýrt, so at fá fóru burtur at ganga í skúla tá.

Á Giljanesi vórðu børnini býtt sundur í sjey flokkar. Børnini gingu saman í flokki úr báðum bygdunum. Tá ið flutt varð inn á Nes, vóru 219 næmingar í fólkaskúlanum og 38 næmingar í framhaldsdeildini í tveimum flokkum.

Fyrsti preliminerflokkurin tók prógv í 1962. Seinasta árið komu næmingar úr Sørvágs skúla í triðja preliminerflokkin og tóku prógv her.

Fyrstilærarin í Sandavági, Sigurð Petersen, varð skúlastjóri, og fyrstilærarin í Miðvági, Jóan Hendrik Samuelsen, varð varaskúlastjóri.

Stór broyting var at koma í henda nýggja skúlan. Har vóru stórar, fínar stovur við miðstøðuhita, stórar, fínar talvur, stór, fín høll, alisfrøðistova, fimleikahøll og stórt spælipláss. Undirvísingartól vóru nú eisini.

Næmingarnir skuldu nú bera seg øðrvísi at. Eitt nú skuldu øll út úr stovunum og niður í skýlið ella út á spæliplássið í fríkorterunum. Tá ið ringt var inn, skuldi hvør flokkur fara í rað og so ganga hampiliga inn. Morgunsangur var í skúlahøllini.

Fyrst í sekstiárunum varð skúlaskipanin broytt. Tá kom realskúli við 8. og 9. flokkum, og seinni 10. flokkur. Preliminerskúlin varð avtikin. Seinasti preliminerskúlaflokkur tók prógv í 1964, og fyrsti realskúlaflokkur tók prógv í 1965.

Seinast í sekstiárunum vórðu serstovurnar: smíðstova, jarnsmíðstova, skúlakøkur og um tað mundið eisini bókasavn gjørd í niðastu hædd. Næmingarnir vóru fleiri, so at neyðugt var at flyta yngstu flokkarnar aftur í gomlu skúlarnar.

Í 1970 fóru Miðvágs-Sandavágs skúli, Sørvágs skúli og Vestmanna skúli í samarbeiði soleiðis, at tær valfríu lærugreinirnar vóru í Miðvágs-Sandavágs skúla, og tær kravdu lærugreinirnar vóru í Sørvági og í Vestmanna.

Nýggj skúlalóg kom í 1979; tá varð realskúlaskipanin avtikin.

Fólkaskúlin skuldi nú fevna um ein sjeyára grundskúla, har undirvísingarskylda var, og tveyára framhaldsdeild við einum 10. flokki. Í 1992 vórðu ymiskar broytingar gjørdar, og í 1997 varð nýggj skúlalóg samtykt í tinginum. Hon fór at virka í 1998, við henni kom nógv nýtt.

Í 1983 fingu vit ítróttahøllina, nýtt bókasavn, nýggjan skúlakøk og tríggjar nýggjar skúlastovur. Stórt hátíðarhald var 5. mars, tá ið høllin og skúlastovurnar vórðu avhendað. Ejvind Vilhelm, varabiskupur, vígdi skúlastovurnar. Bygdaráðsformenninir, byggifrøðingurin og skúlastjórin hildu røðu, og Vágakórið sang. Um kvøldið var veitsluhald á Hotel Vágum.

Í 1986 vórðu høllin og skúlin bygd saman, so at tann stóra forhøllin og nýggj smíðstova vórðu gjørdar.

Høllin hevur havt stóran týdning fyri ungdómin og fyri alla ítrótt í oynni. Ymsar ítróttir hava verið íðkaðar. Samkomur, framsýningar o.a. hava verið.

Evningarstova og tónleikastova vórðu gjørdar har, sum smíðstovan og skúlakøkurin vóru.

Fjøruti ár eru runnin. Fleiri lærarar, sum vóru í byrjanini hvíla nú undir grønu torvu. Aðrir eru farnir úr starvi. Nýggjur skúlastjóri og nýggir varaskúlastjórar og nýggir lærarar er komnir so við og við. Nýggir skúlatænarar og nýggj vaskifólk starvast nú her.

Í søguni ”Avstaðferðin” eftir Heðin Brú, har greitt verður frá eini ferð við bili úr Havn vestur á flogvøllin, verður millum annað sagt:”Vit fara um Stórá, glíða um Giljanes, síggja nýggja skúlan. Felags mentunarborg Sandavágs, Miðvágs og Seyrvágs. Hugaligt at sovorðið mentunartiltak eydnast.”

Tað er ein stórur flokkur, sum her hevur gingið í skúla. Her hevur at kalla allur ungdómurin nomið sær kunnleika og mentan hesi 40 árini.

Á ongum skúla er so gott útsýni yvir hav og oyggjar og út í havsbrúnna sum hesum. Her er víður sjónarringur.

Ein lognardag at standa og skoða tær vøkru oyggjarnar, tá ið sólin skínur, ella í ódnarveðri, tá ið aldurnar ganga síðar og bresta øgisliga upp í klettarnar, rørir sinnið, men á ymsan hátt.

Jú, víður er sjónarringurin. Skúlin hevur roynt at víðka andaliga, kunnskaparliga og mentanarliga sjónarring næminganna á ymsan hátt, so at teir vóru væl førir fyri at fara hiðani út í lívið. Ymist er, hvussu hevur eydnast.

Hjartaliga til lukku á 40-ára degnum.

Heini F. Petersen